# Ung verða sjúk í KØKINUM



*Ung, sum júst eru flutt heimanífrá, eru í tríggjar ferðir so stórum vanda fyri at gerast sjúk av matbakterium enn børn og ung, sum búgva heima!!*

**LESTRARLÍV** Tey ungu mangla ofta grundleggjandi vitan um reinføri, tá tey flyta heimanífrá. Tí verða mammusa frikadellur lættliga avloystar av spýggju og rennukatrinu

Rigmor Dam

August er mánaðin, har tey ungu flyta heimaífrá. Men frælsiskenslan verður ofta køvd í botninum á vesikummuni, tí tey ungu hava ikki lært grundleggjandi reinføri í køkinum. So verða tey smittað av campylobacter-bakterium, sum stórtrívast í einum skitnum køki!

Hetta sigur danska matvørustýrið í herferðini »clean eller klam«, sum fór av bakkastokki í januar í ár.

Sagt verður, at ung, sum júst eru flutt heimanífrá, eru tí í tríggjar ferðir so stórum vanda fyri at gerast sjúk av matbakterium enn børn og ung, sum búgva heima.

Danska matvørustýrið metir, at av teimum umleið 50.000 sjúkutilburðunum árliga vegna campylobacter-bakteriur, eru eini 10.000 ung millum 15 og 24 ár. Men samstundis verður roknað við, at veruligu tølini eru nógv hægri, tí øll fara ikki til læknan og verða tí ikki skrásett.

## Kollegiini ringast fyri

Tað er eisini prógvað, at talið av sjúkutilburðum veksur á hvørjum ári. Roknað verður við, at orsøkin helst er, at tey ungu fáa alt minni við í førninginum heimaífrá, og tí tey skunda sær ov nógv, tá tey matgera, sigur matvørustýrið.

Tað eru serliga í ungdómsbústaðum og á kollegium at støðan er ring í køkinum. Oftast tí tey ungu blanda sevju frá høsnarunga saman við óviðgjørdan mat. Eitt nú gloyma tey at skifta skeribretti, tá tey handfara høsnakjøt og skera salat, og eisini gloyma tey at vaska hendur, tá tey hava nortið við rátt kjøt.

Og TÁ er leiðin ofta vís: Fluks í vesikummuna!

